# Læraravegleiðing

Bókin “Lokaða landið” er triðja bókin í røðini um 5. b. Tað er Helle Thede Johansen, sum hevur skrivað bókina.

Eins og í **Vikarurin** og **Vinurin** er tað, sum eyðkennir røðina um 5. b, at søgurnar fara fram í dag. Næmingarnir kenna seg aftur í hendingum og í umhvørvi, og hetta, í sær sjálvum, gevur flokkinum nógv at práta um.

Ætlanin við hesi vegleiðing er at geva hugskot til, hvørji evni lærarin kann arbeiða við, við støði í bókini *Lokaða landið*. Hugskotini byggja á tilgongdir, har næmingurin kannar og hugsar sjálvstøðugt. Endamálið er sostatt ikki at kanna eftir, um næmingarnir hava fingið alt við. Mælt verður til, at lærarin gjøgnumgongur einstøku kapitlarnar saman við næmingunum. Dentur verður lagdur á kjak um kapitlarnar heldur enn upplestur ein og ein.

Í bókini *Lokaða landið* eru nógv ymisk evni at taka upp, og tað kann tykjast øgiliga rúgvusmikið og tíðarkrevjandi at arbeiða við so nógvum evnum, sum her verða víst á. Men tað er heldur ikki meiningin við hesum hugskotum. Lærarin hevur møguleika at velja burtur úr tey hugskot, ið hann heldur vera áhugaverd, ella sum hann heldur hóska til flokkin, hann undirvísir í. Hvør flokkur er bæði serstakur og ymiskur.

Framferðarhátturin byggir á ta fatan, at næmingar, flokkar og lærarar tíbetur eru ymiskir, og besta úrslitið fæst, um lærarin sjálvur leggur arbeiðið til rættis og lagar tað til flokkin. Harumframt varðveitir lærarin háttarfrælsið.

Tað er stuttligt at fara í djúpdina við onkrari bók, sum flokkurin lesur, og so kann mann velja ikki at lesa onkra aðra bók so neyvt. Um onkur næmingur hevur upplivað, at onkur av hansara nærmastu hevur ella hevur havt *sálarsjúku*, er júst hetta evnið viðkomandi og upplagt at arbeiða við.

Eitt annað, sum vert er at hugsa um viðvíkjandi hugskotum sum hesum, er at læra næmingar at leggja arbeiðið fram. Nú nýggju námsætlanirnar verða tiknar í brúk, og verkætlanir eru kravdar, er ongantíð ov tíðliga at læra næmingarnar at leggja fram. Evni og hugskot sum hesi leggja upp til framløgur. Harumframt eru tey eisini góð hugskot til stíl, bólkaarbeiði ella evnisarbeiði.

# Hugskot til uppgávur *Lokaða landið*, bók 3

Viðvíkjandi lesing er rákið soleiðis, at undanvitan er vorðin ein týðandi partur av lesifatan. Í tí sambandi hevði verið hóskandi at byrja bókina við eitt sindur av undanvitan.

Tá allir næmingar hava fingið bókina í hondina ... **felags**

**Undanvitan:**

- Hyggið at permuni
- Lesið á baksíðuni
- Tosið um heitið á bókini
- Sigur permumyndin nakað
- Hvussu nógvir partar eru í bókini?
- Hvat ímyndar tú tær, at hendan bókin fer at handla um?
- Er nakar, ið kennir orðið etingarólag (anoreksi)? (kjak)
- Er nakar, ið kennir orðið sálarsjúku? (kjak)

Um næmingarnir hava lisið 1. bók *Vikarurin* og 2. bók *Vinurin.* Vit í 5. B er lættari at fara í gongd, tá tey frammanundan kenna persónar, støð, umhvørvi ... t.e. tey hava ta undanvitanina og kunnu hugsavna seg meira um evni í bókini.

**3. bók *Lokaða landið***

**Øll** í flokkinum fáa 1. part at lesa heima, men **ein** næmingur fær heimaarbeiði at skriva stuttan samandrátt um 1. part í bókini og leggja fram fyri flokkinum.

**Øll** í flokkinum fáa 2. part at lesa heima, men **ein** næmingur fær heimaarbeiði at skriva stuttan samandrátt um 2. part í bókini og leggja fram fyri flokkinum.

Soleiðis verður hildið fram, til allir partar eru gjøgnumgingnir, soleiðis at tey kunna fara í gongd við størstu evnini í bókini. Hetta er samstundis eitt gott høvi spakuliga at læra at leggja fram**.**

**NB:** Áðrenn næmingarnir fara heim at lesa 1. part, hevur lærarin saman við næmingunum tikið ígjøgnum møgulig torfør orð og/ella orðingar. Tað kann gerast soleiðis, at orðið/orðingar verða skrivað á talvuna, og tveir og tveir næmingar tosa um hetta í 1. min., áðrenn lærarin tekur yvir.

**Evnini** **sálarsjúka, etingarólag og innlivingarevni** eru tey mest uppløgdu evnini at arbeiða við í hesi bókini, og **vinskapur** er eisini altíð viðkomandi, men hugskot til evni "Vinskap" er longu við í 2. bók. "Sorg" er eisini við í 2. bók, men kann takast afturíaftur og flættast inn í innlivingarevni.

Ljós verður varpað á **etingarólag** í bókini, og tí er upplagt at tosa um tað evnið við næmingarnar. Tað er týdningarmikið, at næmingarnir fáa vitan innan hetta økið, í fall tey sjálv, eitt av vinfólkum teirra, ella onkur, ið stendur teimum nær, skuldi endað í eini slíkari støðu.

"Sálarsjúka" , "Etingarólag" og "Sorg/innlivingarevni" eru øll evni, ið væl kundu verið ein góð byrjan til eina **lítla** verkætlan, so næmingarnir so við og við venja seg til at leggja fram, ein arbeiðsháttur, sum námsætlanirnar leggja upp til, at tey skulu duga í framhaldsdeildini.

Eftir at allir partar í bókini eru gjøgnumgingnir, kundi flokkurin verið býttur í bólkar (3 næmingar í hvørjum bólki sigst vera best, og eru næmingarnir 24 – so vera 8 bólkar).

Bólkarnir fáa neyva vegleiðing um, hvat bólkarbeiðið/arbeiðsgongdin inniber, og bøkur og teldur mugu vera tøkar. Umframt at tosa við heilsusystrina á skúlanum kunnu næmingarnir leita sær tilfar á bókasavninum, á alnetinum og møguligum samrøðum.

T.d. kundi heilsusysturin komið inn í flokkin og greitt næmingunum frá, hvat etingarólag er, ella onkur persónur, sum hevur havt etingarólag.

Gevið gætur: Tá sagt verður **"Eina lítla verkætlan"** – má tað leggjast upp fyri, at hesir næmingar í 5. ella 6. flokki eru ov ungir at fara í djúpdina við slíkum álvarsomum evnum sum hesum, men tað er týdningarmikið, at tey verða upplýst um tey.

# Hugskot til lítla verkætlan 1: Etingarólag

**Bólkur 1:** Hvat er etingarólag? (Anorexia)

**Bólkur 2:** Hví fáa summi fólk etingarólag? Hvat kann orsøkin vera?

**Bólkur 3:** Hvussu kann sjúkan ávirka kroppin?

**Bólkur 4:** Hvørji eru eyðkennini fyri etingarólag?

**Bólkur 5:** Vís á í tekstinum, hvar illgruni kundi verið um etingarólag s. 4. 15, 16, 22, 23, 24

**Bólkur 6:** Hvussu kann etingarólag fyribyrgjast?

**Bólkur 7:** Kannið møguleikar, hvussu fólk við etingarólagi kunnu hjálpast.

**Bólkur 8:** Hvør kann fáa etingarólag og í hvørjum aldri?

Nógv tilfar finst um etingarólag t.d.

**Bøkur og heimasíður: Ung og sund** *Spiseforstyrrelser* eftir Jo Whelan. Forlagið Flachs. 2001. www.flachs.dk

**Baggrund og debat** *Spiseforstyrrelser* eftir Jenny Bryan. Forlagið Flachs 1999. www.flachs.dk

http://www.sinnisbati.fo - https://sundhedsstyrelsen.dk - www.lmsnyt.dk -

www.psykiatrien.rm.dk -

Ungdómssendingin **"Røddin"** hevur sett fokus á hetta evni í okt. 2014

## Allir bólkar leggja fram

# Hugskot til lítla verkætlan 2: Sorg/innlivingarevni (empati)

- 1. Arbeiðið við orðinum “Sorg”, merking, sagnorð, navnorð, umljóð, bending, st. og v. bent
- 2. Hvat kunnu vit syrgja um?
- 3. Hví syrgir Jóhanna?
- 4. Hvat er avleiðingin av sorgini?
- 5. Hvussu kundi Jóhanna komið burtur úr sorgini?
- 6. Hvat heldur Anna um sorgina hjá Jóhonnu? (vís á í tekstinum s. 8, 9 og 10)
- 7. Hvat heldur Barbara um sorgina hja Jóhonnu? (vís á í tekstinum s. 9)
- 8. Hvør at teimum báðum vinkonunum halda tit, hevur meiri tolsemi/innlivingarevni/fatan av, hvussu Jóhanna hevur tað? Hví? (vís á í tekstinum s. 8, 9,10)
- 9. Hvat kundu vinkonurnar gjørt 1. ára dagin fyri at hjálpt Jóhonnu? Hugskot 1
- 10. Hvat kundu vinkonurnar gjørt 1. ára dagin fyri at hjálpt Jóhonnu? Hugskot 2
- 11. Finnið eitt orðatak, ið hóskar væl at tosa um, akkurát í hesum førum viðvíkjandi Jóhonnu

**Bólkur 1:** arbeiðir við spurningi 1, 2

**Bólkur 2:** - - - 3, 4, 5

**Bólkur 3**: - - - 6

**Bólkur 4:** - - - 7

**Bólkur 5**: - - - 8

**Bólkur 6**: - - - 9

**Bólkur 7:** - - - 10

**Bólkur 8:** - - - 11

**Til spurning 9, 10, 11 kundi eitt svar verið t.d.:**

Spurn 9: Vinkonurnar kundu bjóðað sær til at vitja grøvuna hjá pápanum saman við Jóhonnu

Spurn 10: Vinkonurnar kundu t.d. teknað eitt vakurt kort og skrivað í kortið
Góða Jóhanna!
Vit hugsa nógv um teg í dag og vóna, at alt fer at gangast betur ...
Kærar heilsur

Spurn 11: "Eingin kennir mein í annans bein"

Heimasíður:

http://www.berin.fo

http://www.ungeogsorg.dk/

http://www.krisepsyk.no/

http://www.kriser.no/

http://www.cancer.dk/alt+om+kraeft/raadgivning/index1.asp

http://www.krabbamein.fo

## Allir bólkar leggja fram

Fyrr var sálarsjúka nakað, ið ikki varð tosað um. Tað var flovisligt/skammiligt og ókent og bleiv tí ofta krógvað og varð til okkurt ræðandi. Tað, sum vit ikki skilja, kann lættliga kennast ræðandi. Vit koma øll onkuntíð í samband við onkran, sum er sálarsjúkur, og tí er tað týdningarmikið at tosa um hetta evnið, at bróta tøgnina og seta orð á evnið.

# Verkætlan 3: Sálarsjúka

**Bólkur 1:** Arbeiðið við orðinum **"**sálarsjúka" (samansett/kyn/bending/merking/...)

**Bólkur 2:** Hvat er sálarsjúka?

**Bólkur 3:** Hvør kann orsøkin vera, at summi fólk fáa sálarsjúku?

**Bólkur 4:** Hvussu kann ein sálarsjúkur fáa hjálp?

**Bólkur 5:** Greið frá muninum millum eina sálarliga sjúku og eina likamliga sjúku?

**Bólkur 6:** Hvat er at vera øðrvísi? (s. 11)

**Bólkur 7:** Hvussu er atburðurin hjá Barbaru og Onnu, tá tær síggja nakrar menn standa við bussskýlið (s.8)

**Bólkur 8:** Lýsið menninar, ið eru á veg í bussskýlið. (s.7)

**Framløga:**

Tá ið bólkurin leggur fram fyri flokkinum, er tað týdningarmikið, at arbeiðið verður býtt væl ímillum næmingarnar, so øll í bólkinum sleppa framat at siga nakað. Tá framløgan er liðug, kann kjakast vera um, um nakað er at leggja aftrat ... hvat var gott ... hvat kundi verið betri ... og er spurningurin, ið bólkurin fekk, svaraður. Hvat hava tit lært um evnið? Hvat kann gerast uppaftur betri næstu ferð? – Eftirmeting - **Allir bólkar leggja fram**

Heimasíður: www.apotek.fo – www.folkaheilsa.fo – www.patienthåndbogen.fo – www.lsh.fo

**Uppgávuhugskot: Felags fyri allan flokkin**

**Tónleikur:**

Barbara lurtar eftir einum ávísum sangi, tá ið hon hugsar um, at Jóhanna mundi druknað. Hetta kann leggja upp til eitt prát um, hvussu tónleikur ávirkar okkum. Hvussu kann tað bera til?

Latið næmingarnar greiða frá, um tey lurta eftir einum ávísum lagi ella sangi, tá tey eru kedd ella glað, og er onkur sangur ella okkurt lag, sum fær tey at hugsa um/minnast eina ávísa hending.

Lurtið eftir einum klassiskum stykki og latið børnini greiða frá, hvørjar kenslur koma fram av tónleikinum – verða tey glað/syrgin/... o.s.fr.

Tónleikur er eisini ein góður íblástur til at skriva eina søgu/stíl. Eitt gott høvi at fáa hugflogið í gongd. Nógv góð hugskot til góðan klassiskan tónleik at skriva eftir eru á Youtube.com